tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 157 Leygardagur 22. august 1998 | 72. árgangur | www.sosialurin.fo | Kr. 8,00



## Gjaldið frá ÚF ov lítið

Útvarpið rindar tónaleikarum og tónaskøldum ov lítið fyri tónleikin, sigur Kristian Blak. – Vit gjalda meir enn onnur, sigur Jógvan Jespersen Síða 6



## Føroyingar eru sera vinarligir

Lis og Lauge Vestergaard vunnu eina ferð til Føroya í Radio Alfa í Jútlandi Síða 8

## Telefon til Høgna Hoydal

Tað er í morgin, at lesarar hjá Sosialinum fáa høvi at seta Høgna Hoydal, landsstýrismanni, spurningar í sambandi við fullveldisuppskotið Síða 3

**Suðuroyarskipið ognað børnunum í Elba í Italia:**

# Teistin siglandi barnagarður í Italia

Nú eitur Teistin Moby Ale. Hann siglir millum italska meginlandið og oyggjarnar Elba og Korsika - og hann er ognaður børnunum



Hetta er ikki italska útgávan av Jurassic Park, men góði gamli Teistin - ein heilur djóragarður er málaður á síðurnar

Síða 4

# Olja funnin við føroyska markinum

Enn einaferð hevur tað eydnast at finna olju tætt við føroyska markið. Hesaferð er talan um eina rimmar oljukeldu, sum boripallurin Suvereign Explorer hevur funnið Síða 9

# Mamman fekk tey at spæla sjónleik



Systkini Súsanna, Ria og Hans Tórgarð fáast øll við sjónleik, og tey eru samd um, at tað er mammuni fyri at takka. Tó hevur pápin sjálvsagt eisini gjørt sítt. T. d. bakaði hann einaferð allar pannukøkurnar til pannukøkuhúsið, tá børnini leiktu Hans og Greta

Síða 16-17-18

Sjónleikurin hevur altíð havt stóran áhuga í familjuni Tórgarð. Sosialurin hevur hitt alla familjuna

VØRUKOYRING
FLYTING
ÚR FØROYUM
TIL FØROYA
Goymsla & Flytikassar
TILBOÐ verða givin
Lagaligir prísir!
Pf. HP trading
TRANSPORT
Tlf. 3172
Fax 3150

# Funnið rimmar oljukeldu tætt við markið



*Fyri stuttum kom »Sovereign Explorer« fram á eina rimmarstóra oljukeldu beint við føroyska markið*

*Enn einaferð hevur tað eydnast at finna olju heilt tætt við føroyska markið. Hesaferð er talan um eina rimmar oljukeldu, sum samtakið við Arco og Conoco hava funnið*

JAN MÜLLER

Meðan naggatóðn leingi hevur valda í marknatrætuni millum Føroyar og Bretland og henda hevur verið við til at køva ta bjartskygni, sum annars hevur verið í øllum oljumálinum, er eitt nýtt stórt oljufund gjørt skamt frá føroyska markinum, úti í Hvítu Sonuni. Tað er oljusamtakið við Arco og Conoco, sum hevur funnið eina nýggja oljukeldu í tí teiginum, sum bretska stjórnin gjørdi av at designera í sjálvum Hvíta økinum fyrr í ár.

Fundið er tætt við Suilven oljukelduna, sum BP fann herfyri. Keldan sigst vera uppá 400 mill. tunnur. Saman við Suilven fundinum er talan um eitt nýtt oljuøki, sum er størri enn Foinaven og Schiehallionøkið longur suðuri.

Tað er boripallurin »Sovereign Explorer«, sum borar.

Eingin ivi er um, at hetta seinasta fundið kann fáa alstóran týdning fyri alt økið millum Føroyar og Hetland. Her er talan um tað fyrsta veruliga oljufundið síðani, Schiehallion varð funnið fyrr í 90-unum.

At nýggja keldan liggur so tætt upp at føroyska fiskimarkinum er eisini at stórum týdningi fyri alt føroyaøkið. Tað hevur víst seg, at allar tær oljukeldurnar, sum eru funnar vestan fyri Hetland seinatu árini, liggja nær føroyska markinum.

*Telefonverkið fingið nýtt navn:*

# Nú eitur tað Føroya Tele

SVEINUR TRÓNDARSON

Telefonverk Føroya Løgtings er farið í søguna. Tá stovnurin var umskipaður til partafelag skifti hann eisini fyribils navn og kallaðist P/F Telefonverkið.

Men nú er eisini tað farið í søguna.

Fyri at laga seg til tíðina og fyri at skapa sær ein reinari profil - ella image, hevur stovnurin bæði skift navn, samstundis sum hann hevur fingið nýtt búmerki.

I sambandi við broytingarnar er pakki sendur starvsfólkunum soleiðis at tey kunnu lesa um bakgrundina fyri átakinum og nýggja búmerkinum.

Stovnurin viðgongur at tað er sera týdningarmikið, at bæði starvsfólk og viðskiftafólk taka undir við tiltakinum og tí verða fjølmiðlarnir boðnir at meta um tiltakið, um búmerki og um Føroya Tele sum fjarskiftisveitaran, sum framhaldandi skal skapa fortreytirnar fyri føroyska kunningarsamfelagnum, sigur Føroya Tele í tíðindaskrivinum.

Enska heitið á føroyska televerkinum er Faroese Telecom.

FØROYATELE

*Soleiðis sær nýggja búmerki hjá Føroya Tele út*

